**Semja millum**
**øðrumegin**
**Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna**
**og hinumegin**
**Fíggjarmálaráðið**

**Lønarkarmur og tíðarskeið**
Semjan er galdandi fyri sáttmálaskeiðið frá 1. okt. 2017 til 1. okt. 2019.

Tann 1. oktober 2017 hækkar lønin 2,3 % og tann 1. oktober 2018 hækkar lønin 2,4 %.

**Broytt lønartalva**
Lønartalvan fyri handverkarar verður tann 1. okt. 2018 stytt soleiðis, at tvey tey fyrstu stigini fella burtur, og eftirfylgjandi stig broyta nummar.
Handverkarar ganga nú stigini 1 til 11, leiðandi handverkari er á stigi 16 og formenn hjá Landsverki eru á stigi 21.
Fyri at fáa somu lønir fyri handverkarar hjá landi og kommunum, verður tikið støði í lønartalvuni hjá KAF galdandi frá 1. oktober 2016.

**Nágreinað orðing um viðbøtur**
Næsti setningur í § 5. Viðbøtur verður umorðaður til:
Um so er, at starvsviðurskiftini, sum eitt nú sjálvstøðugt arbeiði, sjálvstøðug ábyrgd fyri røkt av bygningum, sjálvstøðug ábyrgd fyri røkt av tøkniligari útgerð, ábyrgd av fólki í vardum starvi, ella aðra týdningarmikla ábyrgd, tala fyri tí, kann verða veitt handverkara eina viðbót afturat tí í § 3 nevndu løn.

**Broyttar ásetingar um eftirløn**
§ 8. Eftirlønargjaldið verður tann 1. okt. 2018 broytt soleiðis:
Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjald av grundlønini eftir lønartalvu galdandi fyri henda sáttmála, og av persónligum viðbótum sambært § 5, í góðkenda eftirlønarskipan sambært eftirlønarlógini.

**Dagføra áseting um barsil**
§ 18. Barnsferð verður broytt soleiðis:
Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.

Stk. 2. Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinnan fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær starvskvinnan farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis vera bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.

Stk. 3. Prógvar starvskvinnan við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør meir enn 4 vikur undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinnan hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.

Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.

Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.
Henda grein fær gildi frá í dag og er eisini galdandi fyri tær barnakonur, sum eru í barsilsfarloyvi við løn frá arbeiðsgevara.

**Tímalønarsáttmáli**
Í sáttmálaskeiðnum verður arbeitt við at gera ein tímalønarsáttmála. Tað áliggur Landsverki at seta gongd á tað arbeiðið innan 1. januar 2019.

Sáttmálin og lønartalvurnar verða dagførdar sambært omanfyristandandi.

Tórshavn tann 21. september 2018.

**Føroya Handverkarafelag**

Suni Simonsen, formaður

**Landsfelag Handverkaranna**

Danial Pauli Djurhuus, formaður

**Fíggjarmálaráðið**

Kristina Háfoss, landstýriskvinna

Jan Mortensen, lønarstjóri